# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Tekniskir studentar 2003

*Hesi hava tikið prógv sum tekniskir studentar á Tekniska Skúla í Klaksvík. F.v.: Bjørn Friður Mikladal, Dorius Johannesen, Dánjal H. Kjærbo, Ulrik í Hjøllum, Hansina Joensen, Sólgerð Joensen, Elin Højgaard, Gunnar Andreasen, Jógvan Joensen og Jaspur Guttesen.*



## 18. juni 2003 fingu hesi prógv handaði á Klaksvíkar Sjómansskúla í grundskeiði til skipskokk

*Standandi frá vinstru: Torvald Danielsen, Klaksvík, Rúni Johannesen, Tvøroyri, Símun Esmar Vágsá, Klaksvík, Karl Jóhan Hansen, Norðskála, Casey Kambsenni, Fuglafjørður. Sitandi frá vinstru: Liljan Poulsen, Nólsoy, Olga Andrea Thomsen, Hvalba, Mariann O. Johansen, Klaksvík, Jónfríð Hjelm, Vági, Josefina Strømsteen, Norðragøta.*
*Óli Samuelsen, Klaksvík, vantar á myndini*
*Hesar fingu virðisløn: Josefina Strømsten fekk gávu frá Norðoya Sparikassa og Mariann O. Johansen fekk gávu frá J.F.K. heilsølu*



## Dugnaskaparskeið í sigling á Klaksvíkar Sjómansskúla

*Standandi frá vinstru: Jens Pauli Jacobsen, Norðragøta, Jørgin Joensen, Morkranes, Helgi Hansen, Strendur. Sitandi frá vinstru: Eydna Jacobsen, Klaksvík, Sámal Olsen,Rituvík.*
*Á myndini vanta: Jákup Erik Johannesen, Tórshavn, Ragnar Mortensen, Øravík, Jóhannes Poulsen, Tórshavn og Óli Andreas Hammer, Eiði.*
*Hesir fingu virðisløn: Ragnar Mortensen fekk gávu frá Føroya Banka og Sámal Olsen fekk gávu frá Norðoya Sparikassa.*

## Tvíburasystrar seksti

Í dag, 1. juli, fylla tvíburasystrarnar Alma og Herdis, føddar Joensen, 60 ár. Tær eru døtur Aase Stecher úr Århus og Johan Peter Joensen úr Hesti. Jóan Petur var skúlastjóri í Klaksvík 1952-56 og fyrsti landsskúlaráðgevarin 1956-65.

Alma og Herdis tóku realprógv í Havn í 1960. Alma var fyrst arbeiðsgenta í eina tíð hjá Edith og Jákup í Jákupsstovu, arbeiddi so í Barnagarði Drotning Ingridar í eitt ár og var á Askov Háskúla veturin 1962-63. Hon tók prógv frá Socialpædagogisk Børnehaveseminarium í Århus í 1965.

Í Århus hitti hon Karl Jóhan Fossá úr Havn, sum las til lækna. Tey giftust í 1964 og eiga tríggjar synir. Jón er føddur í 1965 og er veikstreymsverkfrøðingur. Rasmus er føddur í 1971 og er eisini veikstreymsverkfrøðingur. Frans er føddur í 1972.

Alma arbeiddi í barnagarði í Århus í tvey ár. Síðani var hon á talustovni í Risskov í gott 4 ár. Seinni var hon aftur á Barnagarði Drotning Ingridar.

Í 1975 vóru Alma og Karl Jóhan í Nykøping í Svøríki og fluttu síðani til Tvøroyrar, har hann fekk starv sum kommunulækni. Har vórðu tey búgvandi.

Herdis tók studentaprógv í Havn og fór saman við systrini á Askov. Síðani fór hon á læraraskúla í Hjørring í 3 ár og tók prógv har. Hon fór til Tanzania at vera lærarinda hjá donskum, svenskum og týskum børnum og var har í 3 ár.

Heimafturkomin tók hon við starvinum sum lærarinda í einum lítlum vesturjútskum skúla og var har í meira enn 12 ár. Í hesi bygdini, Sdr Vium, tóku tey eitt árið ímóti skúlabørnum úr Føroyum, og tvey ár vitjaðu børn haðani her.

Herdis fór í 1983 til Tarm at vera lærarinda. Hon tók prógv sum serlærari í 1986 og fekk seinni útbúgving innan hoyrn. Hon starvaðist so sum ráðgevari fyri lærarar í Ringkøbing í 8 ár. Eftir tað arbeiddi hon sum lesi- og staviráðgevari í Egvad. Saman við einum starvsfelaga hevur hon givið út eina bók um stavimedotik.

Í 1990 fór Herdis at halda saman við læknanum Charlotte og seinni giftust tær. Tær vóru fyrsta skrásetta parlag í Ringkøbing.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Fýra nýggir læknar



*Á universitetinum í Keypmannahavn hava fýra føroyingar tikið læknaprógv. Tey eru: f.v. Arnhold Trustrup Jensen, av Tvøroyri, Djóni Sandberg Joensen, úr Miðvági, Eydna Eysturskará, úr Runavík og Rógvi Wintereig Rasmussen úr Tórshavn.*

## Carl Mikkelsen gevst á Oyrarbakka



Eftir at hava verið lærari við Felagsskúlan á Oyrabakka síðan 1973, hevur Carl Mikkelsen, sum fyri kortum fylti 60 ár, sagt seg úr hesum starvi. Carl er føddur 16. juni 1943 í Hoyvík, sonur Onnu Sofíu, f. Joensen úr Vestmanna og Arna Mikkelsen av Velbastað, ið búðu í Hoyvík. Hann tók studentspróv á VBV við Skansavegin í 1962, árið fyri at skúlin flutti niðan í Hoydalar, og læraraprógv á Ranum Seminarium í 1969. Hann var lærari á Sorø Borgerrealskole frá 1969-70 og í Tórshavnar Kommunuskúla skúlaárið 1970-71. Meðan hann gekk á Danmarks Lærer Højskole frá 1971-73, var hann lærari á Ingrid Jespersen Skole í Keypmannahavn frá 1972-73. Síðan 1973 hevur Carl verið lærari á Felagsskúlanum á Oyrarbakka, har hann undirvísti í matematik og fysik/kemi.

Hann hevur ymisk frítíðaráhugamál, sum t.d. at spæla bridge, og hann er limur í dansifelagnum »Tøkum Lætt«. Eisini hevur hann bát, so hann kann fara á flot tá hann hevur hug til tess.

Carl er giftur við Arnleyg, f. Eikholm, úr Hvalvík, tey búgva í Hoyvík og eiga børnini Arna og Onnu Sofíu.

## Jóannes Østerø deyður

25. juni andaðist doyði Jóannes Østerø í Vági, 49 ára gamal. Hann var ættaður úr Mikladali, sonur Mariu Súsannu og Absalon hjá Janusi. Jens, kallaður Janus, var sonur tann kenda Føroyingafelagsmannin Absalon á Trøllanesi.

Jóannes var timburmaður. Hann giftist við Elinborg úr Sumba, og tey búsettust í Vági. Elinborg og Jóannes fingu døturnar Lív, sum tók studentsprógv nú um dagarnar, og Monu.



## Dánjal Johannesen 90 ár

Í dag fyllir Dánjal Johannesen, (Dánjal Eysturi í Líð) á Nesi 90 ár.

Hóast henda høga aldur er Dánjal léttur uppá krop og fylgir við í øllum, sum rørir seg í samfelagnum. Hugurin til sjógvin hevur verið stórur hjá honum. Hann fór tíðliga til skips, fyri síðani at fara á motorpassaraskúla. Tey nógvu árini á sjónum var hann motorpassari. Nevnast kann, at hann var motorpassari á Heyki hjá Skipafelagnum, tá hann fylti 70 ár. Hann hevur verið ein álitismaður, léttur av lyndi, skemtingarsamur, vinarligur og léttur at umgangast.

Dánjal var farin um tey sjúti tá hann legðist uppi. Hugurin stóð støðugt til sjógvin, og tí hevur hann altíð átt bát. Ein partur av tíðini, sum pensionistur, er farin í bátinum, og í egningaskúrinum. Hóast Dánjal nú fyllir 90 ár, so hendir tað enn, at hann fer á prutlinum inn í skúrin at egna. Dánjal hevur verið trúgvur at møtt upp bæði í kirkjuni og í missiónshúsinum. Honum hevur dáma væl at sungi, og hevur hann gott mál. Dánjal er giftur við Herthu, og eiga tey fýra børn. Honum verður ynskt hjartaliga tillukku við degnum.

## Dagurin

**Juli.** Sjeyndi mánaður hevur navn sítt eftir Juliusi Caesar. Í gamla rómverska kalendaranum varð hann róptur *Quintilis*, ið merkir tað, sum hoyrir til tann fimta (mánaðin). Tann fimti var her roknaður frá mars, ið var tann fyrsti. Í árinum 45 f.o.t. samtykti rómverska senatið at geva Quintilis navnið juli, Juliusi Caesar til heiðurs, tí hann fekk í lag tann nýggja kalendaran.

**1. juli. Teobaldus,** deyður í 1066. Franskur aðalsmaður, ið á ungum árum velur eitt lív sum einbúgvi. Var fyrst í Luksemburg, ger so pílagrímsferð til Santiago de Compostela í Norðurspaniu, síðan til Róm og fær sær at enda tilhald í Vincenza í Italiu, har hann varð prestvígdur.